Fróðskaparsetur Føroya

Setursskrivstovan

## Próvdómarasamsýningar

**Samtyktar á setursráðsfundi 26. mai 2005**

**Bólkur 1:**
Munnlig próvtøka: Grundgjald + tímaløn fyri ta tíð, ið gongur - sbrt. lestrarskránni. Vanliga er munnlig próvtøka einar 30-45 minuttir, men við eftirmeting kann verða roknað við, at 1 tími gongur til hvønn student.

**Bólkur 2:**
Skrivlig roynd 4 tímar og undir: Grundgjald + ½ tíma til meting fyri hvønn student.

**Bólkur 3:**
Skrivlig roynd longri enn 4 tímar, upp til 6 tímar: Grundgjald + 1 tíma til meting fyri hvønn student.

**Bólkur 4:**
Skrivlig roynd yvir 6 tímar: Grundgjald + 1 ½ tíma til meting fyri hvønn student.

**Bólkur 5:**
Skrivlig heimauppgáva á støðisnáminum: Grundgjald + 1 ½ tíma til meting av einum studenti. Er talan um bólkauppgávu, verður lønt við grundgjaldi + 1 tíma faldað við tali á studentum.

**Bólkur 6:**
Skrivlig heimauppgáva á Bachelor- og Master náminum: Til meting av einum studenti verður roknað grundgjald + 1½ tíma fyri skeið 10 ECTS ella minni, grundgjald + 2 tímar fyri skeið 11-19 ECTS, grundgjald + 2½ tímar fyri skeið, sum hava 20 ECTS ella meira. Er talan um bólkauppgávu, verður roknað grundgjald + 1 tíma fyri skeið 10 ECTS ella minni, grundgjald + 1½ tímar fyri skeið 11-19 ECTS, grundgjald + 2 tímar fyri skeið, sum hava 20 ECTS ella meira, faldað við tali á studentum.

**Bólkur 7:**
Bachelorritgerð: 6 tímar fyri hvønn student. Er talan um bólkauppgávu, verður lønt við 4 tímum faldað við tali á studentum.

**Bólkur 8:**
Høvuðsritgerð: 10 tímar fyri hvønn student. Er talan um bólkauppgávu, verður lønt við 7 tímum faldað við tali á studentum.

**Bólkur 9:**
Masterritgerð: 12 tímar fyri hvønn student. Er talan um bólkauppgávu, verður lønt við 8 tímum faldað við tali á studentum.

**Bólkur 10:**
Ritgerðarfyrilestur: 2 tímar, um talan er um sama próvdómara, sum dømdi ritgerðina. Er annar próvdómari, verða 2 tímar (tímasatsur 1) latnir afturat fyri at lesa ritgerðina.

Grundgjald er 1 tími við tímasatsi 2. Hetta er gjald til próvdómaran fyri at fyrireika seg uppá pensum. Er lærarin leysalærari, verður hann samsýntur eins og próvdómarin, tó fær hann ikki grundgjald. Viðvíkjandi gjaldi fyri gerð av próvtøkuuppgávum o.a. verður víst til aðrar reglur.

Postrúm 272
FO 110 Tórshavn
J. C. Svabos gøta 14
FO 100 Tórshavn
Heimasíða
www.setur.fo
Teldupostur
setur@setur.fo
Telefon:
35 25 00
Faks:
35 25 01

Har talan er um samansettar próvtøkur, t.d. skrivliga heimauppgávu og munnliga roynd, verða próvdømingarnar samsýntar hvør sær, tó verður bara eitt grundgjald latið.

Í førum har ikki ber til at bólka próvtøku innan omanfyri nevndu bólkar, skal avtala verða gjørd frammanundan um samsýning

Postrúm 272
FO 110 Tórshavn
J. C. Svabos gøta 14
FO 100 Tórshavn
Heimasíða
www.setur.fo
Teldupostur
setur@setur.fo
Telefon:
35 25 00
Faks:
35 25 01